Eitt úrslit vit kunnu taka støðu til

Røðan, Jóannes Eidesgaard helt í sambandi við opningstalu forsætismálaráðharrans

På Færøerne har vi ikke så mange statuer, som der er tradition for i andre lande. Men på en absolut hædersplads - i Torshavns centrum - lige foran et af Europas ældste parlamenter - Færøernes Lagting - står der en buste. Det er af en beskeden kulturperson og samfundsiagttager, der kaldtes Rasmus Effersøe.

Rasmus Effersøe var en klog mand, som opnåede stor respekt som kulturperson, men også som samfundsanalytiker. Han var kun medlem af Lagtinget i fire år fra 1897 til 1901, og det var altså før de første partier gjorde deres indtog i 1906. Men han var dog en af hovedpersonerne bag den organisation, der banede vej for en færøsk selvstyrepolitik. For en god orden skyld skal jeg gøre opmærksom på, at han ikke var socialdemokrat.

Rasmus Effersøe var med i Færingeforeningen, hvis hovedopgave på det tidspunkt, d.v.s. for ca. 120 år siden, var at arbejde for, at færøsk kultur og det færøske sprog fik sin retfærdige placering på Færøerne. De første mange år var denne bevægelse ikke organiseret politisk, men blev det først senere.

Som sagt - Effersøe var en klog mand, og han kunne ikke forene sig med den tendens, der ret tidligt viste sig i visse kredse af denne selvstyreorganisation med devisen, at vi skal det hele eller slet ikke noget - det ultimative eller intet, vi kan ikke stille os tilfredse med noget mindre. Og det skal ske her og nu.

Rasmus Effersøe advarede imod denne tendens og sagde, at det var nødvendigt, at man holdt en trend i udviklingen af færøsk selvstændighed, som føringer kendte sig trygge ved. Hans budskab var: „Lad os sætte udviklingen i gang - lad os tage os den nødvendige tid, så opnår vi resultater - men går vi kun efter det endelige resultat, så kan det meget nemt ende med, at udviklingen mere eller mindre går i stå“.

Rasmus Effersøe døde i 1916.

Jeg har citeret ham flere gange under de ofte livlige debatter, vi har haft i Lagtinget omkring landsstyrets løsrivelsesplaner. Og specielt er det et digt, der handler om en flok får, der om vinteren i megen sne er fanget oppe på fjeldet. De stakkels får kan hverken komme frem eller tilbage, for de kan simpelthen ikke blive enige om, hvilken vej, der nu er den fornuftigste.

Men så pludselig dukker der en vædder op, som uden tøven eller selvransagelse byder hele flokken til at følge sig. Han føler det som sit kald at finde en vej ud af uføret. Men han er desværre så optaget af sine lederrolle, at han helt glemmer at orientere sig og finde ud af, hvilken vej, der nu er den rigtige.

Resultatet er fatalt, da vædderen og hele flokken, der jo blindt fulgte ham, går ind over en bjergside, som er så glat, at de slet ikke får fodfæste, og hele flokken med vædderen i spidsen falder ud over klippekanten og ned i havet.

Og netop dette digt er digtet i forbindelse med den udvikling, som Rasmus Effersøe så for sig i begyndelsen af sidste århundrede omkring selvstændighedsspørgsmålet. Og min påstand, hvis vi nu skruer tiden frem til det dagsaktuelle, har været, at jeg tydelig kan se for mig nøjagtig samme tendens, desværre.

Det kan selvfølgelig være fristende for politiske magtpersoner at indtage en sådan rolle som vædderen, og desværre må vi konstatere, at hos en del af befolkningen ligger der et latent behov for at følge trop med den lederskikkelse, der nu viser sig egnet.

Vi opfatter ikke i vores hverdag forholdet til Danmark som en trussel mod vores overlevelse eller eksistens, således som nogle prøver at give udtryk for. Og selv om det ihærdigt bliver forsøgt at piske en stemning op imod Danmark for alt mellem aftalebrud og rendyrket imperialisme, så er sagen den, at den almindelig færing ikke opfatter rigsfællesskabet som en belastning, tværtimod. Almindelige færinger opfatter ikke selvstændigheden som et „enten/eller“ spørgsmål - eller som et „sort/hvidt“ billede.

Lad os derfor tage gamle Effersøe´s tanker til os, at det er nødvendigt, at man i sådan en stor sag dyrker den brede konsensus, der er i den færøske befolkning omkring spørgsmålet.

Ethvert eksperiment og ethvert forsøg bør have et formål. Man vil opnå et eller andet, som måske i det tidlige stadie ligger i det ukendte. Man vil gerne opnå en forbedring af tingenes tilstand. Politik er eller bør ikke være så meget anderledes. Man træffer beslutninger for at forbedre forholdene for så mange som muligt. Politiske beslutninger bør ikke gå på, at man gerne vil skrive sit eget navn i historiebøgerne, men på, at man i den lille stue huskes i stilfærdig taknemlighed.

Nationalismen har ikke nogen særlig høj prioritet i vores ideologiske model, hvorimod situationen er den modsatte hos republikanerne. Men før vi kaster befolkningen ud i en folke-afstemning, har den krav på at få svar på nogle spørgsmål. Først og fremmest, hvilke konsekvenser vil den suveræne færøske stat få for den almindelige færings almindelige hverdag?

En udtrædelse af rigsfællesskabet er ikke for os i Socialdemokratiet et mål i sig selv, lige så lidt som ønsket om en fortsættelse i rigsfællesskabet er et mål i sig selv. Det er de samfundsrelaterede konsekvenser, der har betydning.

Det er politikernes opgave at sørge for, at vi i hele diskussionen hele tiden har jordfæste, at vi ved hvad vi gør, og at vi ved, hvilken kurs, vi skal gå. Og det er heller ikke nemt at erindre folk om, at det er hverdagens muligheder, der tæller. Det ville være lettere at lade sig rive med af stemningen. Men hvem har egentlig sagt, at det skulle være nemt.

Hvorfor tænker I ikke lige så optimistisk og positivt som republikanerne? Hvorfor skal I hele tiden minde os om det grå og det kedelige? Hvorfor snakker I om levestandard, skattetryk, afgifter, uddannelser, sociale ydelser, muligheder til alle o.s.v. - hvorfor snakker I ikke også om det færøske sprog, det færøske flag, den nationale identitet, olajfest o.s.v.?

Jamen, det gør vi også. For os er det en selvfølge, som vi ikke bruger så megen tid på at diskutere. Intet parti på Færøerne har mere ihærdigt og ærligt kæmpet for disse værdier, end netop vores parti. Men disse er for os alt for hellige til at misbruge.

På den anden side ser vi det som vores hovedopgave, at komme hverdagen i hu. At påtage sig rollen som den grå hverdagssamvittighed, er meget sværere end opgaven hos dem, der følger vædderen. Vi skal formulere os meget bedre, vi skal bruge flere ord og flere argumenter, og så er det alligevel ikke sikkert, at det lykkes. Jo, det gør det nok i sidste ende.

Når det er sagt, så må jeg erindre om, at selvfølgelig bor der også i vore hjerter et brændende ønske om, at vi færinger tager fuldt ansvar af vores eget land. Det skal der ikke herske nogen som helst tvivl om. Og det er da vores klare målsætning, at vi stadigt udbygger vores selvbestemmelse på alle områder, men for en socialdemokrat vil det alligevel under normale omstændigheder kunne vise sig fordele ved at gå ind i et samarbejde. Samarbejdsformen giver parterne i samarbejdet en fælles og gensidig styrke.

Det skal ikke forstås på den måde, at vi ikke vil vide af den politiske frihed, nej tværtimod, men vi vil ikke betale en pris for den politiske suverænitet, der betyder en kraftig nedgang i den personlige frihed. Hvis den politiske frihed betyder, at valgmulighederne for tilrettelæggelsen af et aktivt liv bliver mindre for den almindelige færing, så er vi skeptikerne. Det er et rent ideologisk spørgsmål. Så enkelt er det nu engang.

Det er med andre ord ikke løsrivelsen, der er afgørende, men det samfund, der opstår i kølvandet af løsrivelsen. For republikanerne er spørgsmålet det modsatte. For dem er løsrivelsen det som sagen drejer sig om, men samfundsforholdene bagefter, ja det må man tage, som det nu viser sig at være. Og det er vel også i sidste ende et spørgsmål om ideologi.

Og når vi snakker om en suveræn stat, så må man tage som en selvfølge, at man selv er i stand til at forvalte alt det, der hører et moderne samfund til. Og alene på dette område mangler vi utroligt meget, og det er vigtigt, når vi går i gang med disse overtagelser, at vi så vidt muligt kan rekruttere færinger til det administrative arbejde.

Hvis vi siger, at hele denne proces har to trin, så har vi opskriften her til trin et, som nødvendigvis må komme før vi taler om trin to. Første trin er at forberede samfundet til at stå på egne ben politisk, administrativt og økonomisk, mens trin to for os er selve udtrædelsen af rigsfællesskabet, hvis færingerne til den tid finder det som den bedste løsning.

Kort sagt, er status den: at koalitionen vil udføre trin to, mens vi vil udføre trin et.

Vi siger først trin et, så må tiden vise, hvad der så sker med trin to. Den afgørelse skal træffes af de færinger, som til den tid har ansvaret for det færøske samfund.

Den dag kan selvfølgelig opstå, at danskernes veje og vores ændres så alvorligt, at friheden hos den enkelte færing - friheden til et godt liv - ændres så markant, at vi finder det rigtigst at skilles. Det kan ske p.g.a. udviklingen på kontinentet f. eks. p.g.a. en endnu stærkere dansk integrering i EU, og så kan det hurtigt vise sig, at et flertal ønsker at løsrive sig.

Koalitionen siger trin to, mens trin et mere eller mindre bliver overladt til eftertiden og en ny koalition. Parolen ligner den norske med, „at det grejer sig i sjøen“. Det er den omvendte rækkefølge. Det er ikke særlig seriøst at begynde byggeriet med et rejsegilde, selv om det kan være meget festligt.

Det økonomiske spørgsmål viser sig at være sværvægteren i de forhandlinger, der er i gang. Selv om vi ønsker, at rigsfællesskabet fortsætte, så ønsker vi en selvstændig færøsk økonomi. Vores forslag er, at bloktilskuddet fra Danmark bliver reduceret i et forhold til væksten i den færøske BNP. Derved kan bloktilskuddet reduceres og bortfalde, uden at det får uheldige konsekvenser for den færøske økonomi og derved den færøske velfærd.

Hvis vi skulle træffe den endelig afgørelse om udtrædelse efter vores koncept, så ville vi ikke komme i samme situation som landsstyret, som har en suverænitetsplan, der hviler på forståelse og velvilje fra en dansk regering. Vi ville igen få den stolthed, der bør være i en sådan sag, at vi med en høflig afsked bebudede oprettelsen af den færøske stat.

Men dagens politikere skal gøre det nødvendige forarbejde, så det er kun et spørgsmål om at komme i gang. Trin to afgørelsen er absolut ikke relevant på nuværende tidspunkt, og bør først være det, når trin et er udført.

Et gammelt ordsprog siger, at man skal smede, mens jernet er varmt. Vi har en historisk periode i færøsk politik lige nu, for samtlige partier, inklusivt Sambandspartiet, går ind for ændringer i forholdet til Danmark. Og det er historisk, for det er aldrig sket siden 1906. Uenigheden består i graden af ændringer, de forskellige partier ønsker. Men i og med, at samtlige partier vil flytte sig, så findes der også en fællesnævner. Den tilfredsstiller selvfølgelig ikke republikanernes ønsker om løsrivelse eller Sambandspartiet ønsker om forsigtige ændringer, men den tilfredsstiller en stor majoritet i den færøske befolkning.

Min appel i forbindelse med de igangværende forhandlinger skal være, at begge parter omgås sagen med den nødvendige værdighed. Uanset om man er uenig i hinandens forhandlingsudspil, så bør begge parter behandle hinandens ønsker på en civiliseret og respektfuld måde. Det skylder vi vores historiske fortid, og det skylder vi vores fremtidige samarbejde.

Og selv om den ene part bevidst prøver at fremprovokere sammenstød og kollisioner, så bør det heller ikke give anledning til, at vi får et forhandlingsmiljø, som vi ikke kan være bekendt med. Vi har jo begivenhederne omkring landsstyrets brevveksling med FN og landsstyrets ønske om at møde Nato,s generalsekretær. Og vi har episoden omkring udenrigsministerens udmelding om de forudsætninger og betingelser, der er gældende for et evt. medlemskab af Partnership for Peace, hvor landsstyret absolut ikke er enig med ministerens svar til dette spørgsmål.

Alt dette burde være undgået, hvis man havde den fornuftige dialog, der burde kendetegne vores samarbejdsform. En dialog, der er båret oppe af en gensidig respekt.

Endelig vil jeg også komme med en appel om, at de igangværende forhandlinger ikke får lov til at trække unødvendigt ud, da den færøske politiske dagsorden stort set kun indeholder denne sag, selv om vi burde være meget stærkt optaget af at løse andre vigtige sager i det færøske samfund.

Lad os få et resultat af forhandlingerne, således at det færøske folk kan tage stilling. Og skulle det ske, at resultatet bliver forkastet, så må vi i gang med nye forhandlinger med et ændret forhandlingsgrundlag. Derfor er det så vigtigt, at vi også efter de igangværende forhandling kan se hinanden i øjnene.

Jóannes Eidesgaard

Lesarabrøv

Til fótbólts við juristi

Kappingarárið er lokið! VB hevur vunnið, tað skerst ikki burtur! Tillukku VB.

Men søtdið hevur eisini verið so lágt í ár – og GÍ, B36, B68 og onnur lið vóru so óbegrípiliga fitt at lata VB vinna! Men hvussu verður nú við komandi kappingarárið?

At løgmaður og landsstýrismenn ikki vita, hvat teir hava sagt, fyrr enn sakføraarnir hava talað, er so ein søk.

Og stakkals stýrisskipanarlógarfedrar, sum eru í somu støðu: »Manus manum lavat!«

Men at fótbóltssambandið selur eina kappingarskipan – uttan at vita, hvat stendur í henni, tað má av sonnum sigast at vera lágt støði!

Hví eru UEFA-reglur ikki galdandi í Føroyum?

Hvar er sovandi (fjórða) statsvaldið?

Amerikanarar eru tiltiknir fyri at siga »Okur hittast í rættinum«. Skal nú hvørt mál, skotið á føroya vølli, og hvør fótbóltsdómur til viðgerðar í Føroya Rætti? So verður stuttligt at lesa bløðini komandi ár! Hugsið tykkum til:

»VB vann á Toftum, har oraklið býr, men teir høvdu eisini góðar sakførarar við!«

Við ítróttarkvøðu.

Arnfinnur Thomassen

Fer ráðagerðin frá 1946 at endurtaka seg?

Síðani henda samgongan varð skipað við tí greiða endamáli at skipa Føroyar sum fullveldisríki, hevur danska stjórnin saman við andstøðuni (Javnaðarfl./sambandsfl.) ikki fylgt fólkaræðisligu mannagongdunum, av tí at hesi hava í felag strongt á tíl tess at fáa samgonguna **at ganga frá sínum vallyftum um sjálvstýri fyri Føroyar**, men heldur **»saðla av nýggjum«** og reka ein politikk, ið hóvar minnilutanum og donsku stjórnini.

Poul Nyrup Rasmussen hevur latið løgmann skilja, at um samgongan broytir ætlan sína og fer at reka ein politikk, ið samsvarar við tann, ið javnaðarflokkurin stendur fyri, so verður eingin endi á vælvildini frá danskari síðu mótvegis Føroyum.

Hinvegin, um samgongan vágar sær at reka egnan politikk, **ið hon var vald uppá at reka,** so skulu treytirnar gerast harðar sum grót.

Hetta er dømi um, hvussu **»fólkaræðisliga« »danska stjórnin/andstøðan her á landi« hugsa**, tá tað ræður um veruligt føroyskt sjálvstýri, men tað var júst hetta sama, ið hendi í **1946**, tá danska stjórnin og politikarar her á landi gingu saman í ráð til tess at **sleppa uttan um** úrslitið av fólkaatkvøðuni.

Gerið ikki neyðsemju um fullveldisætlanina

Andstøðan í Føroyum hevur fingið tann greiða setning frá donsku stjórnini, at hon má gera alt, ið gerast kann til tess at fáa føroyingar at ganga frá kravinum um fullveldi, men heldur taka við andstøðuuppskotinum um at gera eina ella aðra heimastýrisskipan, og teir hava eisini fingið at vita, at skipanin kann innihalda næstan hvat sum helst, bert ikki fullveldi (suverenitet).

Vit kunnu eisini fáa okkara egnu grundlóg, um hon bert ikki stríðir ímóti teirri donsku, ið skal galda fyri alt ríkið, t.e., at okkara heimastýrisgrundlóg, ið verður ein »undirdeild« má ikki nevna orðið (suverenitetur).

Føroyskir fullveldispolitikarar mugu ikki gera tað dáraverk, ið tað er, at gera neyðsemju um fullveldisætlanina, tí so er »slottið næstan vunnið« hjá teimum trimum »Nyrupunum«, har vit eiga teir tveir, tíverri.

Um vit gera neyðsemju um nýggja heimastýrislóg

Tá hetta er hent, fer danska stjórnin alt fyri eitt at seta arbeiðsbólk (»færøgrupp«) av serfrøðingum, um hesin ikki longu er settu, til tess at máa støðið undan einum framtíðar føroyskum ynski um fullveldi. Tað fer at verða gjørt bæði inanríkis, men ikki minst á internorðurlendskum og altjóða støði.

Serstakliga fer hetta at verða ein løtt uppgáva, um vit góðtaka eina nýggja heimastýrisskipan við fólkaatkvøðu, sum gevur hampiliga stóra undirtøku, av tí at tú kanst ikki góðtaka innliman í eitt annað ríki og so nøkur ár seinni iðra teg um tað og krevja sjálvstýri.

ST fer eisini við tíðini at avmarka talið av fullveldisríkjum, so haðani fer eingin hjálp at koma seinni.

Sambandsflokkarnir einsamallir um nýggja heimastýrisskipan

Um tað ólukkuliga skuldi hent, at einstakir fullveldispolitikarar fara at »ridla«, sum onkur tekin eru til, og mæla til eina nýggja heimastýrisskipan saman við javnaðar/sambandsflokkinum, meðan »bíðað verður við fullveldinum«, ið skal koma seinni, sum tað so lokkandi fer at ljóða, so eiga fullveldispolitikarar at lata hesar vera púra einsamallar um **»ráðagerðina«**, av tí tá fer tað neyvan at eydnast at fáa stóra undirtøku millum fólk við fólkaatkvøðu, helst bert u.l. helmingin av veljarunum, og tað fer danska stjórnin ikki at vera nøgd við, og fer hetta at gera framhaldandi ráðagerðina nógv truplari, og stríðið um fullveldi/sambandi fer at halda fram enn harðari enn í dag í føroyskum politikki, tí var tað ikki nóg mikið við einum lítlum meiriluta í 1946 fyri fullveldi, so kann tað heldur ikki vera nóg mikið í dag við einum lítlum meirilut afyri sambandi ella nýggjari heimastýrisskipan.

Nýggj heimastýrisskipan verður »katastrofa«

Um fá ár fer tað at verða avdúkað, at nýggj heimastýrisskipan gjørdist »katastrofa« fyri Føroya land og føroyska fólkið, og tá verður brúk fyri politikarum við reinum hondum.

Serliga um olja av týdningi verður funnin, tí tá fer danska stjórnin als ikki at vilja hoyra talan um eitt møguligt krav um fullveldi seinni. Tá verða bert aðrar umberingar og onnur gróthørð krøv sett føroyingum. Hesa støðu fer danska stjórnin at fyrireika alt fyri eitt, um nýggj heimastýrisskipan verður sett í verk. **Danska stjórnin fer ikki at droyma um at lata ríkt oljuøki frá sær við tí altjóða týdningi fyri Danmark, ið hetta fer at hava við sær. Bíða bara, livst, so spyrst.**

Ísraelski forsætisráðharrin: »Um tú ikki hevur suverentitet, so hevur tú einki«.

Eg haldi, at tað var hin 11. august, at Barak var í sjónvarpinum, har hann á einum fundi segði soleiðis um fullveldið (suverenitetin): **»Tá eitt fólk ikki hevur suverenitet, so hevur tað einki«. »Hví«, spurdi hann út í høllina. »Jú, tí um tú ikki hevur fullveldi, so mást tú alla tíðina taka ímóti ordrum ella boðum uttaneftir«.**

Hetta tók hann uppaftur fleiri ferðir við øðrum orðalagi, so tað var týðuligt, at hesin royndi politikarin visti, hvat hann tosaði um.

»Soleiðis eru viðurskiftini ikki í Føroyum«, hoyri eg sambandsrøddir svara. Nei, einki skal vera í Føroyum sum aðrastaðni. Her skal alt venda niður, ið aðrastaðni í heiminum vendi rupp. Tað er gamla frágreiðingin um, hví Føroya fólk ikki fyri alt í verðini má taka stig til at gerast tjóð millum aðrar tjóðir.

Jú, tjóð, men ikki enn, og hetta »enn« kemur ongantíð, verið vís í tí!

Trúgva vit meira upp á donska blokkin enn á Skaparan?

Vit føroyingar hava fingið fleiri tjóðareyðkenni enn flestu onnur fólkasløg, men **vilja tó ikki gerast tjóð,** hóast landið er bæði gott og ríkt. Trúgva vit ikki uppá, at Harrin vil varðveita okkum sum egin tjóð? Er tað kanska tryggari at dansa um danska »blokk-gullkálvin«? Tað ljóðar annars úti í heimi, at føroyingar eru sera gudrøknir. Ja, skulu ikki standa aftan fyri granntjóðirnar ella kanska væl tað. Hetta er eftir mínari meting ein av størstu andsøgnunum ella »paradoksum«, ið eg veit um.

Danska stjórnin rennur undan ábyrgdini:

Endamálið við teimum 4 árunum er sjálvandi at ræða føroyingar frá at taka fullveldi, men heldur kroysta eina neyðsemju oman yvir høvdið á okkum eins og í 1946: Nýggja heimastýrisskipan. Tað vita øll bæði úti og heima.

Slíkt er ikki rættvíst, av ti at danir sjálvir gjørdu hesa skipan í 1948, har føryski landskassin gjørdist bundin at donskum ískoyti. Sostatt hava danir her eina serliga ábyrgd fyri føroyskum búskapi, og tá teir nú spæla »grótharðir«, ivaleyst eftir ráðum úr Føroyum, so avdúkar tað eisini, hvør ætlanin við ríkisískoytinum var í 1948.

Forðar føroyskum sjálvræði við vilja:

Hetta, at danska stjórnin í veruleikanum rennur undan sínari fíggjarligu ábyrgd, sum hon sjálv gav seg undir sambært heimastýrisskipanina frá 1948 og heldur misnýtir skipanina til tess at leggja forðingar í vegin fyri før. sjálvstýri, man fyrr ella seinni fara at gerast almannakunnugt í politiska lívinum alla staðni, fyrst í Norðurlondum, men eisini víða hvar úti í heimi.

Spurningurin verður tá, um tað ikki fer at koma donskum uttanríkspolitikki aftur um brekku, tá onnur kunnu vísa á, hvussu danska stjórnin í veruleikanum bar seg at viðvíkjandi føroyska ynskinum um fullveldi.

Skipanin skuldi helst nýtast til at gera Føroyar so bundnar sum gjørligt at danska statinum og júst nýtast sum trýstamboð, um fullveldisynski einaferð fór at koma úr Føroyum, tí hetta er ikki peningaspurningur fyri donsku stjórnina. Um sammett verður eftir fólkatali, so svarar 1 mia. kr. út úr danska búskapinum til 10 mill. kr. út úr tí føroyska.

Føroyska »heimastýrið« nakið – sum keisarin á sinni

Mong av okkum hava billað okkum inn, at heimastýrið er nakað heilt serligt, men so er ikki. T.d. hevur verið greitt frá í fjølmiðlunum, at undirgrundin er yvirtikin, men tað er beinleiðis skeivt.

Vit hava »allernådigst« fingið rættin til at standa fyri útvinningini av møguligum ráevnum t.d. kolvetni úr **donsku undirgrundini við Føroyar**, hetta vegna danska ríkið. Sostatt er eingin **»føroysk undirgrund« til í politiskum høpi**, hóast tað mangan verður málborið seg soleiðis í fjølmiðlunum. Um danski landsluturin Føroyar verður vælhavandi av møguligum ríkidømi, so byggir hetta alt ríkið upp tilsvarandi.

Sostatt var einki í vegin fyri, at danska stjórnin gav t.d. amtsráðnum á Bornholm somu loyvi at vinna møgulig ráevni út har, sum okkara løgting hevur fingið her.

Føroyska málið sett í 2. rød av donsku stjórnini:

Fáur mundi droyma um, at danska stjórnin fór at staðfesta í evropeiskum sáttmála, **at føroyskt ikki kann javnmetast við onnur tjóðarmál**, og tað ger hon mitt í samráðingunum um før. sjálvstýri. Hetta sýnir betur enn nakað annað, **hvussu vís danska stjórnin er í, at tað fer at eydnast at kroysta eina nýggja heimastýrislóg niður yvir okkum føroyingar.**

Nú hevur føroyskt mist nógv av síni tign, tá tað í bindandi sáttmála er staðfest, at føroyskt ikki er annað enn eitt **»minnilutamál« í danska ríkinum**, javnsett við týskt í Suðurjútlandi. Mær vitandi, so hava týskarar ikki so mikið sum »heimastýri«, har teir búgva.

Alt hetta skuldi henda í tí Harrans ári 2000. Hevði tað verið stutt eftir aldarskiftið 1900, so hevði eg skilt tað.

Brævið til ST

Talsmaður fyri donsku stjórnina segði stutt eftir, at gitna brævið var kunnugt, at um føroyingar skuldu sleppa at senda brøv til ST, so máttu bornholmarar eisini sleppa at gera hetta, tí teir høvdu uttan iva okkurt at tala við ST um eisini.

So er tað sagt.

Danskir stjórnartalsmenn meta okkum saman við »Bornholms Amt«. Man hetta vera tað, ið føroyingar flestir hugsa um, tá talan er um hitt »víðagitna før-oyska sjálvstýrið«?

Tó má eg siga, at hetta undrar als ikki meg. Tí í veruleikanum er »sjálvstýri« ikki til. Antin hevur tú óavmarkað sjálvstýri, ella hevur tú als einki sjálvstýri.

Nakað heilt annað er so tað, at sjálvstøðug lond kunnu gera sínámillum avtalur til fyrimuns fyri báðar ella fleiri partar, ið á summum økjum avmarka teirra sjálvstýri, meðan sáttmálin er galdandi.

Slapp ikki at tosa við Nato-aðalskrivaran:

Á natofundinum í Íslandi varð rættiliga avdúkað, hvussu lítið heimastýrið er flatið, tá sjálvt Føroya løgmansembæti ruddiliga varð sett upp á »rætta lítla pláss sítt«.

Danska stjórnin vísti hesum okkara hægsta fyrisitingarliga starvi so lítla virðing, at løgmanni varð sett mark fyri, hvønn hann slapp at tosa við, hóast Føroyar vóru í nógv størri vanda fyri at gerast álopsmál undir »kalda stríðnum«, enn Danmark nakrantíð var.

Slíkt er sjálvstýri, sanniliga!

Mong onnur dømi av líknandi slag kunnu nevnast, ið sýna, hvussu lítið okkara sokallaða sjálvstýri hevur uttan á sær.

Takið við skiftistíðini upp á 4 ár:

Vit mugu taka við skiftistíðini upp á 4 ár, tí eitt er vist, at treytirnar verða ikki lagaligari seinni, heldur tvørturímóti.

Danska stjórnin **vil í veruleikanum ikki geva Føroyum fullveldi. Tað mugu øll hava skilt.** Seinni um t.d. 10 ár finna teir upp á aðrar harðari treytir og undanførslur móti fullveldinum. **»Grova arbeiðið«** við ræðumyndunum her heima í Føroyum fer sama andstøða at gera tá eins og nú fyri donsku stjórnina.

Míni ráð skulu tí vera: Takið við skiftistíðini upp á 4 ár. Latum okkum sýna donsku stjórnini, at tað veruliga eru **»Knotur í føroyskum kongum«, og at hetta er ikki nakað, ið vit bert syngja um, tá høvur er frótt av »fullum maga« við okkurt veitsluborð.**

Asbjørn Lómaklett